## Deksbátur til sølu



Vegna Sp/f Barkhellu í konkurs, verður deksbáturin m/b Leyvoy VN 232 hervið lýstur til sølu.

Báturin er bygdur í Tórshavn í 1920 og er tilfarið úr eik/furu.

Talan er um ein sokallaðan "sluppunga", bygdur eftir gomlum føroyskum handverksstandarum, og hevur báturin fiskiloyvi í bólkinum 5B.

Báturin verður seldur til hægstbjóðandi.

Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge á tlf. 31 12 60 ella á teldupost jjl@lawfirm.fo

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
110 Tórshavn, Boks 359
Tlf. 311260, fax 311261
e-mail: lawfirm@lawfirm.fo

*Tormóður Djurhuus • Jógvan Páll Lassen • Petur Even Djurhuus • Jógvan E. Ellefsen • Anna Dam • Ingi Højgaard Jóhan J. Lamhauge • Gunn Ellefsen • Mimi Steintórsdóttir*

## Størv í Landsmiðstøðini

### Bókavørður

Eitt starv sum bókavørður er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um vanligt bókavarðaarbeiði, eitt nú skráseting, røkt, avgreiðslu og ráðgeving.

Starvið fevnir eisini um aðrar *ikki-bókavarðauppgávur* sum bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipanina Aleph/eLib-booking, og hevur bókavørðurin saman við KT-vørðinum ábyrgd av samskiftinum við veitaran av skipanini.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- útbúgving sum bókavørður
- royndir við bókasavnsarbeiði
- royndir og/ella áhuga fyri bókhaldi og at nýta FSL-skipanina
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum, og sum kennir til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

### Skrivstovufólk

Eitt starv sum skrivstovufólk er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um móttøku og avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipaninar Aleph og eLib-booking.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- skrivstovuútbúgving/skrivstovuroyndir
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

### Felags fyri bæði størvini

Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin, ert tú tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um størv í fulla tíð. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. oktober 2007.

### Umsókn

Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. oktober 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo**

**Landsmiðstøðin**

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.



## 10. mannafar til sølu

Opin bátur, ið er væl røktur. 45 hesta maskinu. GPS/VHF/GSM telefon o.a. Báturin hevur fiskiloyvi

**Prísuppskot, kr. 130.000**

**Telefon 219376**



## HÚS Í MIÐBÝNUM TIL LEIGU!

Hugnalig og væl hildin hús í miðbýnum til leigu frá 1. januar 2008. Húsini eru tils. 170 m$^2$ og hava sera gott útsýni, tey liggja væl fyri í yndisligum umhvørvi framvið Rættará og eru vælegnaði til eina familju at búgva í.

Prísur 10.000-12.000,- um mánaðin

**Um tú hevur áhuga ring +353 862631306.**

# Summarhús

## í Svínoy til sølu

Grundøki er umleið 400 m$^2$ matr. 13 við tilhoyrandi hjalli sum er í besta standi

Húsini eru 9x11 alin til støddar og eru totalt renoveraði í 1993, beklødd við Føroyaprofili, bjálvaði og øll vindeyguðu eru skift.

Kjallarahæddin er klødd – øll sum hon er – við timbri, og er innrættað við brúsurúm og vaski.

Miðhæddin er alt eitt rúm við køki og stovu, umframt eina lítila gongd.

Lofthæddin hevur 2 sovirúm gongd og vesi. Pláss er til 10 liggjandi gestir.

Húsini eru øll klødd innan við profilbrettum sum eru hvítbeisaði

Húsini hava sentralvarma og hava eisini ein hugnaligan kolovn.

Húsini liggja úti á uttara Vali í sera hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi.

Húsini verða bert seld um nóg høgt boð verður givið.

**Telefon 456436 / 250436**